## VIÐMERKINGAR

Tíðindaskriv frá Sjálvstýrisflokkinum

# Oljuvinnan og politikarar

Sámal Petur í Grund
*formaður tingbólksins*

Stórur áhugi og stórur spenningur hevur verið hjá øllum Føroya fólki fyri oljuvinnuni, so hvørt sum hon er komin nærri og nærri oyggjum okkara.

Politikarar hava sjálvandi fylgt væl við hvussu arbeiði hevur verið gjørt av teimum myndugleikum sum hava varða av hesum øki. Og eitt hava allir politikarar verið samdir um og tað er, at heppin hevur hondin verið higartil.

Fyrstu ferð at sundurlyndi føroyinga gav seg til kennar í hesum so týðani málið, var tá Javnaðarflokkurin skeyt upp, at alt oljuvirksemi skuldi fara fram útfrá Suðuroynni.

Hóast ein av samgonguflokkunum er umboðaður í Suðuroynni, so eydnaðist tað til teirra rós, at semjast um, at alt landið skuldi hava møguleika at bjóða seg fram, men at atlit skuldi vera tikið til útjaðaran.

Nú er so komið so langt áleiðis, at greitt er at arbeiðstak-ararnir ynskja at leggja partar av sínum virksemi, annaðhvørt í Tórshavn ella Runavík.

So seriøsur sum Tjóðveldisflokkurin var, tá málið um at løggeva oljuvinnuna til Suðuroyar var til viðgerðar, líka so óseriøsur er sami flokkur, tá hann, nú arbeiðstakararnir eru komnir til eitt úrslit, sigur at oljuútgerðarhavnin skal til Suðuroyar.

Sjálvstýrisflokkurin fer ikki at lata sær lynda, at stórur partur av landinum verður koplaður av, nú komið er uppundir land.

Við vón um at Føroya fólk fer at standa øksl móti øksl øllum fólki okkara at gagni.

# Yvirlýsing frá Føroya Javnaðarflokki um oljuútgerðarhavn

Javnaðarflokkurin

Sum ein ítøkilig fylgja av, at sitandi samgonga saman við Sambandsflokkinum hevur svorið sín trúskap til, at tað bert eru marknaðarkreftirnar, t.e. kapitalurin, sum skal gera av, hvussu viðurskiftini í okkara samfelag laga seg, hoyrdu vit í Útvarpinum í gjárkvøldið og fjølmiðlunum annars í dag, at komandi oljuhavnin skal vera í Havn ella Runavík.

Tá uppskotið til løgtingslóg um fyrsta útbjóðingarumfar til leiting eftir og framleiðslu av kolvetnum var til viðgerðar í tinginum, legði Javnaðarflokkurin dent á, at tað var neyðugt, at løgtingið gjørdi av, hvar ein komandi oljuútgerðarhavn skuldi liggja. Hetta gjørdi flokkurin fyri at tálma óhepnu miðsavningini í landinum og til tess at loysa ein bygnaðartrupulleika, sum so avgjørt er politiskur.

Flokkurin legði tí sum einasti flokkur broytingaruppskot um at leggja oljuútgerðarhavnina í Suðuroy. Minnilutin í vinnunevndini – Javnaðarflokkurin - setti soljóðandi broytingaruppskot fram við 2. viðgerð: "Leitingar- og framleiðsluvirksemið úr Føroyum, herundir m.a. við útgerðarstøðum, skal ganga út úr Suðuroy".

Hetta uppskot fekk 11 atkvøður fyri, 1 blanka, 19 atkvøddu ímóti. Øll javnaðarumboðini atkvøddu sjálvsagt fyri.

Tað undrar Javnaðarflokkin, at tey, sum lovprísaðu marknaðarkreftunum og feldu uppskot Javnaðarfloksins, nú gera vart við seg í fjølmiðlunum, sum tey, ið vilja bjarga tí skaðiligu gongd, sum sjálvsagt mátti koma í kjalarvørrinum av hesum, og nú krevja spurningin loystan júst eftir leisti Javnaðarfloksins.

Hinvegin fegnast vit um hesa kúvending og vóna, at álvari er aftanfyri orðini hjá serstakliga Tjóðveldisflokkinum.

Um hetta ikki enn einaferð bert eru krokodillutár, so má fylgjan vera, at samgonguflokkarnir taka málið uppaftur til nýggja viðgerð og saman við okkum broyta lógina samsvarandi uppskotinum hjá Javnaðarflokkinum 2. februar 2000.

# Landsstýrið og verjuskipið Brimil

Edmund Joensen

Nú gongur á triðja mánað síðani nýggja verjuskip Føroya, Brimil var liðugur. Hesa longu tíð hevur tað ligið og gnaðað gummi í Noreg. Samlaði kostnaðurin sigst vera umleið 120 mió. krónur. Harumframt kostar skipið í bíðistøðu, havnagjøld, vakt, manning og aðrar útreiðslur hvønn dag.

Henda handfaring er vorðin ein stór landaskomm í sjálvum sær. Eisini er tað ein sera góð mynd av okkara handlingslamna landsstýri. Eitt landsstýri sum ikki so frætt sum megnar at fáa sítt egna stásiliga verjuskip út at sigla.

Verjuskipið sum skal verða størsta álitið í verju, tilbúgving og bjarging í Føroyum, liggur svínabundið við kai í Noreg, vandamestu tíð á hávetri. Boð kunnu verða hvørja løtu eftir hjálp.

Orsøkin er, at sáttmálaviðurskiftini hjá yvirmonnunum ikki eru komin uppá pláss. Ábyrgdari fyri hesum viðurskiftum er Føroya Landsstýri sjálvt.

**Fullveldislønarlag**

Landsstýrið hevur eftir øllum at døma eina meining um, at Føroyar kunnu isolera seg við egnum lønarlagi, uttan at hugsa um, at okkara sjómenn eru mobilasta fólkaslag í heiminum. Teir sammeta seg sjálvandi við sínar kolegar í grannalondunum við somu viðurskiftum. Teir blása á landsstýrisins ætlanir um eitt serligt "fullveldislønarlag".

Álvaratos. Hvat munnu okkara grannar ikki halda um handliførið hjá okkara fullveldislandsstýri?

Hvat man ST-aðalskrivarin Kofi Anand ikki halda um handlimegina hjá okkara landsstýri?

Hvat man aðalskrivarin í Nato (Robertson lordur) halda um hetjurnar úr Føroyum, sum brutu seg inná hann í Íslandi, og vildu hava limaskap í Partnership for Peace ? Hvat man hann ikki halda um handlimegina hjá nýggja umsøkjaranum í eini kreppustøðu hjá Nato ?

**Føroysk mál burturav**

Tíðiligari og tíðiligari kemur til sjóndar, at tað sum landsstýrið fast við, endar í einum hurlivasa. Brimil liggur svínabundin í Noreg, og í farnu viku steðgaði bussleiðin í Suðuroy.

Hesaferð ber neyvan til at skylda uppá donsku stjórnina, tí málini eru "periføroysk".

Hetta eru so bara prógv afturat teimum óteljandi, um ódugnaskap landsstýrisins.

# Eitt avlop sum ikki loypur av

Helgi Abrahamsen
*10. januar 2001*



Vit hava nú í nøkur ár hoyrt um stórt yvirskot hjá landskassanum. Ikki minst í sambandi við fullveldisætlanina hevur verið ført fram, at "blokkstuðulin loypur av", og at vit tí ikki hava brúk fyri honum longur.

Í seinastu ólavsøkurøðu, segði løgmaður at avlopið fyri 1999 var 648 mió. krónur, og at saman við avlopinum hjá kommununum varð tað helst oman fyri 850 mió. krónur.

Fyri "vanliga" fólkið er henda útsøgnin sera einføld: Tá 648 mió. krónur leypa av, so merkir tað fyri ein vanligan føroying, at tá árið er liðugt, og alt er goldið, eru 648 mió. krónur meira í kassanum, enn tá árið byrjaði. Tá so avlopið einaferð verður líka stórt sum blokkstuðulin, kunnu vit loysa frá Danmark, uttan at tað fær búskaparligar avleiðingar.

Hetta er tó sera langt frá veruleikanum.

**Ár 2000**

Avlop landskassans fyri ár 2000 skal eitast fyri at vera uml. 500 mió. krónur. Men um vit hyggja eftir tí, sum stóð í Landsbankanum (t.v.s. uppsparingini hjá landskassanum) í ár 2000, so síggja vit, at vøksturin av innistandandi kemur ikki í námd av 500 mió. krónum. Til dømis stóðu í november 2000, 8 mió. krónur minni í Landsbankanum, enn í november 1999.

Tølini svinga alla tíðina, og tí ber ikki til at gera nakra niðurstøðu út frá hesum. Tó stendur fast, at uppsparingin hjá landskassanum fíggjar einki fullveldi.

Skiftisgrunnur við ongum pengum

Eftir at landsstýrið hevði fingið at vita frá donsku stjórnini, at ein møgulig skiftistíð, ikki fór at vara í meira enn 4 ár, segði landsstýrið, at tað nú fór at skipa sína egnu skiftistíð. Í ólavsøkurøðuni segði løgmaður, at talan var um ein skiftisgrunn "ið fer at geva landsstýri og løgtingi møguleika at leggja eina egna, trygga skiftistíð til rættis yvir eitt ávíst áramál". Hetta ljóðar bæði gott og lovandi.

Trupulleikin er bara tann, at tøki peningurin at leggja í grunnin røkkur ikki langt.

Í lógini um landsbankan stendur, at peningur, sum svarar til15% av bruttotjóðarúrtøkuni skal altíð standa í bankanum. Tað vil siga, at umleið 1 milliard er bundin, og kann tí ikki nýtast til at fíggja skiftistíðina.

Restin (um alt verður nýtt) er nógv minni enn tað sum svarar til blokkstuðulin í eitt ár!

Tað vil siga, at landsstýrið kann ikki so mikið sum leingja skiftistíðina frá 4 upp til 5 ár. Hvussu skal landsstýrið tá tryggja "eina trygga skiftistíð yvir eitt ávíst áramál"?

Hetta er støðan, aftaná at vinnan hevur havt nøkur gullár. Hvussu verður so, tá tað fer at ganga hinvegin aftur?

**Fíggjarlógin fyri komandi ár**

Tað er alment kent, at tá eitt valskeið er um at nærkast endanum, hava politikarar lindi til at verða "gávumildir." Henda gongd er longu við at henda í Føroyum, nú eitt gott ár er eftir av valskeiðnum.

Upprunaliga fíggjarlógaruppskotið fyri 2001 vísti eitt avlop á 482 mió. krónur, men avlopið tódnaði ógvuliga nógv undir viðgerðini í løgtinginum, og longu 3. januar (tá árið var 2_ døgn gamalt) vísti útvarpið at siga, at ársins fyrsta eykafíggjarlóg var á veg. Síðani hava tvær aðrar verið nevndar, og kosta hesar tilsamans uml. 30 mió. kr. (vit eru komin eina góða viku inní januar).

Tað er millum annað av hesi orsøk, at tað er so umráðandi fyri landsstýrið at hava fólkaatkvøðu um fullveldið beinanvegin. Við henni skulu komandi politikarar bindast til at gera tað sum eitt villleitt fólk velur. – Eitt fólk sum framvegis trýr, at yvirskot landskassans er nóg stórt, til at tryggja vælferðina í Føroyum, sjálvt um Føroyar gerast fullveldi.